Starv sum málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya

Søkt verður eftir málsviðgera til Sandoyar Øki. Tann umsøkjarin, vit fyri kortum valdu út, tók annað starv. Tí lýsa vit starvið leyst av nýggjum.

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Sandoyar Øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
tollskatt@tollskatt.fo

Høvuðsuppgávur
Álíkningar- og eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald og toll, skatt og innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann, ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir. Í ivamálum hevur hann beinleiðis tilvísing til deildirnar í Stýrinum.

Førleikakrøv
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Eisini er ynskiligt, men tó ongin treyt, at viðkomandi býr í Sandoynni.

Vit kunna bjóða
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Spurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Randi Røsvik, roknskaparleiðara, á tlf. 35 26 00.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

19. oktober 2001

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið
Postsmoga 2151
FO 165 Argir

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2798, P/F Nólsoyar Alistøð, 270 Nólsoy.

Nevnd:
Farin úr nevndini sum formaður: Kári Nielsen, Pedda við Steinsgøta 7, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina sum formaður: Odd Eliasen, Mørkin 8, 530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya tann 3. oktober 2001

Kristin Balle

Nýtt telefon nr.

Toll- og Skattstova Føroya, Vága Øki,
380 Sørvágur,
hevur fingið nýtt telefon- og fax nr.:

avgreiðslan tlf. 357700 og fax 357701
tolleftirlitið tlf. 357710 og fax 357711

Vikarur

Søkt verður eftir vikari til Leirvíkar skúla at undirvísa fult tímatal fyri lærara í farloyvi frá 1. november í eitt hálvt ár. Meira fæst at vita um starvið á telefon 443234 ella 286935.

Møguligar umsóknir skulu sendast til:

Skúlastýrið fyri Leirvíkar skúla
Att.: Jákup Tróndheim
520 Leirvík

Størv sum málsviðgerðar

Toll- og Skattstova Føroya

Søkt verður eftir 2 málsviðgerðum til Streymoyar øki. Einum til fast starv á eftirlitsdeildini og einum sum avloysari í eitt ár í innheintingini til setan 1. november 2001 ella so skjótt, sum til ber.

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Streymoyar øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo

Høvuðsuppgávur
Eftirlitsdeildin:
Daglig málsviðgerð og eftirlit serliga innan MVG og vinnuskránna, herundir svara munnligum og skrivligum fyrispurningum.

Førleikakrøv
Eftirlitsdeildin:
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligt innlit og kunnleika til vinnulógir umframt skatta- og avgjaldslógir. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Høvuðsuppgávur
Innheintingardeildin:
Daglig málsviðgerð av almennari skuld, herundir gera gjaldsavtalur, útrokningar av gjaldsførisførleika og svara munnligum og skrivligum spurningum frá viðskiftafólki.

Førleikakrøv
Innheintingardeildin:
Tann, sum settur verður, skal helst hava kunnleika til innheintingarbeiði og innlit í roknskaparviðurskifti. Tað er ein fyrimunur at hava prógv í incasso v.m. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgving-armøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Vit kunna bjóða
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Spurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Hallbjørg Hansen, deildarleiðara, á tlf. 31 02 60, lok. 108.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

15. oktober 2001

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

ADC-Heilsølan
Lóarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD SIERRA
árg. 85-86, 2300 diesel til sølu fyri 18.000 kr. Best eftir kl. 19.
Tlf. 451182

OPEL ASCONA
árg. 87 til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 260499

FORD COURIER
vøruvognur, árg. nov. 98. Koyrt 49.000 km, er í sera góðum standi. Prísuppskot: 75.000 kr.
Tlf. 282511

VW GOLF
árg. 89 til sølu. Krevur smávegis ábøtur. Prísuppskot: 9.500,-
Tlf. 313320

VØRUBUSSUR YNSKIST
Kann býtast um við bil.
Tlf. 317865 - 224910

FORD MONDEO
diesel, árg. 98, til sølu.
Tlf. 316005 / 220710

HONDA ACCORD 2,0 EXI
Árg. 88, el-rútar, sóltak, 16" sportsfelgur, senkaður, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 223488, e. kl. 19

TIL SØLU
Mitsubishi Starion 2000 turbo intercooler 180 hk, uml. 122.000 km, hevur leðursetur, aircond., el-rútar og nýggj dekk.
Tlf. 214693

FORD ESCORT 1,8
diesel, st. car, árg. 96, 154.000 km, sýnaður 09/2001, fullfíggjaða servicebók, krók, sentrallás. Bilurin er innfluttur úr Týsklandi og er í góðum standi. Prísur 75.000 kr.
Tlf. 220795 / 316450

TIL SØLU
Daihatsu Charade 1,0cc, árg. 88, við skaða, til sølu fyri hægsta boð.
Tlf. 321206 - 221006

TIL SØLU
Ein Honda Accord 2,0 LX, árg. 87, væl hildin.
Tlf. 321168, e. kl. 17

VOLVO 240
árg, 85, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 444101

TOYOTA CARINA 2.GL TIL SØLU
Reyður, árg. 89, v/ sportsfelgum og eyka sportsfelgum, koyrt 180.000 km, sýnaður 7/01, í sera góðum standi.
Tlf. 330543 - 227518

HONDA CIVIC 1,6i VETEK
árg. 91, 160 HK, manglar tendring, men annars er bilurin í sera góðum standi. Nógv er gjørt við bilin. Til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 255751 ella 455877

HÚS Í KLAKSVÍK
Húsini Bumshamarsvegur 5 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 456215

TOYOTA COROLLA 1.3
aut. gear, árg. 5/91 í finasta standi til sølu.
Tlf. 447512 ella 217512

NISSAN PATROL
Vinstra framhurð kr. 3.000,- til sølu.
Tlf. 218778

MERCEDES
2 stk. Mercedes 190 2.5 diesel við skaða til sølu.
Tlf. 217778 ella 218778

PÍKADEKK TIL SØLU
4 góð píkadekk á felgum til Toyota Corolla, til sølu fyri 4000.00 kr. Stødd á dekkunum 175/70R - 13. Stødd á felgunum 13x5j 2.6 89/4
Tlf. 424530 ella 222087

NISSAN SUNNY 1,6
12 ára gamal, 162.000 km, eyka sett av felgum, alufelgur á, í góðum standi, til sølu fyri uml. 14.000 kr.
Tlf. 226886, e. kl. 17

FÝRA PÍKADEKK
155/80 R 13, ein vetur gomul, til sølu.
Tlf. 333013, e. kl. 18

ASTRA STATIONCAR
1,7 D, árg. 93, nýliga lakeraður, til sølu. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 333421

TIL SØLU
Mitsubishi Galant turbo diesel, árg. 94, við sportsfelgum til sølu .
Tlf. 456405

YNSKIST
Er nakar, sum hevur fýra felgur við píkadekkum, 175/65-14, 4 hol, til sølu.
Tlf. 455876

HJÁLP!!!
Vil onkur ikki hava ein Toyota Camry 2,0 GLI, árg. 86. Hann koyrir væl, sýnaður í '00, ongan kross. Kom og gev eitt boð.
Tlf. 321342

FORD ESCORT 1,3
árg. 77, til sølu fyri 4.000 kr. Sýnaður í ár.
Tlf. 375186 - 222893

ISUZU KBD 47
1350 kg, frá 88, biliga til sølu.
Tlf. 373450

YNSKIST
Eykalutir til ein Ford Sierra, árg. 89, og motorur til ein Mitsubishi Lancer (1500 cc), árg. 85, hevur eisini áhuga.
Tlf. 217362

SAAB 900
til sølu. Árg. 88, nýsýnaður og í góðum standi, koyrt 130.000 km.
Tlf. 447387

TIL SØLU
17" sportsfelgur til Mercedes, 5 hol, við dekkum 225/45x17, hava bert rullað 500 km, til sølu fyri 8.800 kr. Nýprísur 14.000 kr.
Tlf. 312880 251158

MERCEDES 280 SE
árg. 84, 199.000 km, krevur ymsar ábøtur, til sølu, møguliga í býti við annan bil.
Tlf. 312880 251158

BMW 316
svartur, v/ 15" sportsfelgum, fløguspælara, árg. 87, sýnaður í 01, til sølu.
Tlf. 321726, e. kl. 17

NÝGGJ PÍKADEKK
155/80 R 13, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 313334

TOYOTA COROLLA COUPE
reyður, árg. 2000, koyrt 9000 km, til sølu.
Tlf. 252976

OPEL ASCONA
frá 88, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 219021

TOYOTA COROLLA
árg. 90, í góðum standi, biliga til sølu.
Tlf. 253242

4 FELGUR
til Ford Ka biliga til sølu.
Tlf. 373054

OPEL ASCONA
frá 1987 til sølu fyri kr. 4.000,-
Tlf. 452010

HONDA ACCORD 2.0
2 ára gamal, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 252260

TIL SØLU
Leysur sleipikrókur til Peugeot 306, sum nýggjur, til sølu fyri 2.000 kr. Kostaði 3.000 kr. nýggjur.
Tlf. 447830

TIL SØLU
Peugeot 106, 1.5 diesel, árg. 98, til sølu vegna flyting. Bilurin koyrir yvir 20 km/litur, er væl viðfarin og er í sera góðum standi.
Tlf. 215741

TIL SØLU
Mercedes Benz 300 TD, 7 persónar, krók, árg. 84, bláur, inkl. píkadekk, nýsýnaður. Hyundai Elantra 1,5 GLI, árg. 92, nýsýnaður, fløguspælara v/ box , inkl. píkadekk. Toyota Camry 2,0 GLI, hvítur, árg. 86, nýsýnaður, heilársdekk. Opel Vectra diesel, árg. 92. Tlf. 317865 - 224910
e-mail: trade@post.olivant.fo

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
40 ára gomul kvinna við nógvum arbeiðsroyndum søkir arbeiði aðru hvørja viku.
Tlf. 252610

ARBEIÐI SØKIST
15 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð og í vikuskiftunum.
Tlf. 317715

ALT TIMBURARBEIÐI
verður gjørt væl og biliga. Tlf. 370776, e. kl. 18 og tlf. 253139 kl. 8.00–18.00.
Ragnar Gudmundsen

JEG TILBYDER
at udføre mindre have-og flisearbejde med mere.
Tlf. 314434

ALT FYRIFALLANDI ARBEIÐI
verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

Barnaansing

DAGRØKTARMAMMA
søkist til 5 ára gamlan drong í Havn. Best hevði verið, um tú hevur javngomul børn, hann kann spæla við. Hetta er tó eingin treyt.
Tlf. 317574

SØKIST
Barnagenta/kona ella ein omma, sum kann ansa eftir okkum 1-2 ferðir um vikuna kl.12-17, meðan mamma er til arbeiðis og babba er í skúla. Vit eru 9, 8 og 5 ár. Mamma og babba siga, at vit eru so fitt og nemm.
Ring 441060 - 222280

ER TAÐ NØKUR FITT
álítandi kona/genta, sum er øgiliga góð við børn, ið kann ansa eftir mær gerandisdagar frá kl. 8.00 til uml. kl. 15.00 meðan mamma er í skúla? Eg eiti Bjarta og eri 1 ára gomul. At byrja beinanveg.
Tlf. 315792

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Grønur koyristólur av merkinum Odder til sølu fyri 1.500 kr. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 312192 - 254619

TIL SØLU
Brio barnavognur við lift og selum til sølu fyri 3.000 kr. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 316817 ella 350868

TIL SØLU
Ein lítið brúktur, 3 ára gamal, grønur Odder barnavognur. Grøn Odder babylift og puslitaska.
Tlf. 332584 - 221139

Bátaútgerð

YNSKIST
Solé-Mini 34, 31 HK motorur ynskist til eykalutir.
Tlf. 313320 ella 243547

TIL SØLU
Perkins TD 140 motorur til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 317511 - 221578

LÍNUBÁTUR
við línu og 8 oljutrýst snellum, til sølu.
Tlf. 332236

BÁTAMOTORUR
Tveir-cyl. Sabb motorur 16-20 HK til sølu. Lensipumpa, oljutrykk, VHF, kumpass, aksul, skrúva, alt fylgir við.
Tlf. 375289

TIL SØLU
Alpelko ekkolodd til sølu við botni.
Tlf. 361372

GOGGURÚSUR
Er tað nakar, sum hevur goggurúsur at selja okkum.
Tlf. 447512 ella 217512

STIGFJORD 28
glastrevjabátur til sølu. Báturin er klárur til fiskiskap. Boð undir 400.000 ongan áhuga.
Tlf. 444632

BRENNIEVNISTANGI
til bát til sølu: Rustfrítt stál. Mát: H: 40 cm x B: 60 cm x L: 110 cm. Rúmd: 260 litrar.
Tlf. 315210

4-MANNAFAR
Glasfipur 4-mannafar við 8 hestar páhangsmotori til sølu.
Tlf. 253492/315072

LÍNUSPÆL
Eitt línuspæl til 10-mannafar og fimm snellur, hálvaut. til sølu.
Tlf. 333168

Bingo

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 11. okt. kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

AB STUÐLAR
skipa fyri bingo í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 18. okt. kl. 19.30. Millum annað verða tvey lomb burturlutað og nógv annað gott verður at vinna.
Stuðlarnir hjá Argja Bóltfelag

BÁRU-BINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsinum og sølubúðum um alt landið. Tú sært beinanvegin, um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

GOTT BINGO
verður í Eydnuni sunnudagin 7. okt. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl eitt lamb. Á lutaseðli trý lomb. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag

VÁGS PENSIONISTAFELAG
hevur bingo í Framtíðini leygardagin 6. okt. kl. 17.00. Nógvir góðir lutir. Høvuðsvinningur eitt lamb.
Nevndin

HALLÓ!
Um tykur eiga okkurt at lata til loppumarknað, t.d. ting, møblar ella bøkur, vinarliga ring til Anitu á tlf. 372008, ella Anniku á
tlf. 250245

LOPPUMARKNAÐUR
og køkutombola verður í Fylking leygardagin 27. okt. kl. 10–14.00.
Tvøroyrar Svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Stórt seyðabingo verður í Skúlagarðinum mánakvøldið 8. okt. kl. 19.00. 20 lomb verða at vinna. Góðir rekkjuvinningar. Burturluting millum spølini. Eykaspæl. Burturluting: 8 lomb, olja og bensin.
Flogbóltsdeildin T.B.

BINGO
verður í Pálsstovu 8. okt. kl. 19.00. 6. og 12. spæl eitt krov. Høvuðsvinningur á lutaseðli eitt 21" sjónvarp. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Astma- og Allergifelagið

TARVAMYKJUKAPPING
verður leygardagin 20. okt. Stað: Millum Posthúsið og Telefonhúsið, Klaksvík. Tarvurin vigar uml. 550-600 pund, og vinnarin fær hann døgurðakláran. Seðlar seljast á hesum Shell-støðum: Klaksvík, Norðragøtu og Ringvegnum í Havn.
Báran

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 6. okt. kl. 16.00. Lamb á lutaseðli.
Eldrafelagið Borgin

Bøkur

TIL SØLU
10 bind av Hagerups konversationsleksikon til sølu. Eru frá 1948-53.
Tlf. 319919, e. kl. 18

Burturm. /funnið

EFTIRLÝSING
Tygum, sum í seinastu viku tóku eina brosju, sum hekk á einum kjóla uttan fyri handilin Sirri á Áarvegnum, vinarliga berið hana aftur ella send hana dulnevnt. Hon er dýrabar fyri eigaran! Brosjan er antik, rund við nógvum perlum í ymsum litum.
Sirri, Áarvegur 14, tlf. 321706

BURTURMIST
Eg havi mist eitt gamalt silvur armband burtur í vikuni. Finnur nakar tað, ger so væl og ring til mín.
Tlf. 318406 - 283406

VEÐURLAMB UPPTIKIÐ
Svart veðurlamb upptikið millum Horna í Havnardali. Ringi
Tlf. 312236

KLÆÐI OG SKÓGVAR
gloymd á summarlegu hjá Heimamissiónini í Nesvík, kunnu avheintast í Leguhúsinum til 12. okt. 2001.
Summarlegurnar, tlf. 422533

FUNNIÐ
Damubrillur funnar uttan fyri SMS fríggjadagin kl. 16.30. Stellið er grønt, reytt og svart. Ringjast kann á
Tlf. 316992

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki